# Trongt í summar




*Ætlar tú at gista á Sjómansheiminum á ólavøsku 2003, er tíð at biða um pláss nú. Í ár er eingin kjansur at fáa kamar*

**Hotel Tórshavn, Tórshavnar Sjómansheim, er fult upptikið í summar. Og sama støðan er á teimum flestu hotellunum, sigur stjórin**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Tórshavn:** Sjómansheimið er fult upptikið í summarmánaðunum. Men restina av árinum kundu væl verið fleiri gistingar. Eisini um ólavsøkumundið komandi ár er upptikið.

Stjórin á Tórshavnar Sjómansheimi, Jeffrei Johannesen, letur væl at undirtøkuni í summar, men harmast samstundis um, at sesongin er so stutt.

– Tríggir mánaðir føða einki hotel, sigur hann og vísir á, at hann væl kundi hugsað sær, at fleiri fólk búðu á Sjómansheiminum uttan fyri hásesongina.

Hann sigur tó, at tey á Sjómansheiminum eisini væl merkja, at meira ferð er á samfelagnum sum heild, enn tað hevur verið fyri bara nøkrum árum síðan.

Alt tað nógva virksemið, sum er í landinum, sæst aftur í forrætningsfólki, montørum og øðrum, sum koma uttanlands at arbeiða ymsastaðni í Føroyum. Teir skulu so búgva onkunstaðni, og tað plagar vanliga at vera á hoteeli.

Um komandi summar sigur Jeffrei Johannesen, at Tórshavnar Sjómansheim hevur ikki pláss fyri øllum, sum biðið hava um hús. Tað er sum í Betlehem undir kendu fólkateljingini, at tey verða víst frá durunum, tá tey spyrja. Eisini ferðaløgum, sum hava biðið pláss fyri bólkum, hevur Sjómansheimið verið noytt at siga frá sær í summar, sigur hann.

### Ov fáir týskarar

Hann metir, at tað nú eru fruktirnar av tí marknaðarføring, føroyingar hava gjørt utanlands, sum vísa seg. Tó heldur hann, at alt ov fáir týskarar vísa seg á hotellunum í mun til ta peningarupphædd, brúkt verður upp á at marknaðarføra Føroyar í Týsklandi.

Gaman í fær Smyril Line sín part, sum eisini er gott. Men gistingarhúsini síggja lítið til teirra, tí teir flestu búgva í campingvognunum, teir koyra við.

Hinvegin eru amerikanarar farnir at vísa áhuga fyri Føroyum, sigur stjórin á Sjómansheiminum.

Hann vil ikki siga nakað vist um, hví tað er vorðin sovorðin áhugi fyri Føroyum í USA.

Grundirnar kunnu vera ymiskar, og tann høgi dollarakursurin mótvegis krónuni kann spæla inn.

Men tað kann eisini vera, heldur Jeffrei Johannesen, at amerikanarar eru farnir at leita sær eftir friðarligum ferðamálum, har teir meta seg kunna vera rímiliga tryggar.

Men stóra talið av útlendskum ferðafólki, sum býr á Sjómansheiminum, eru skandinavar. Og serliga danir eru nógvir í tali.

Tað vísir seg, at ávís ferðafeløg hava fastar túrar til Føroya, og tey biða so um pláss í góðari tíð. So longu nú eru pláss umbiðin til næsta ár, sigur Jeffrei Johannesen, stjóri á Sjómansheiminum í Havn.

### Tungt at reka

Jeffrei Johannesen, sum eisini er formaður í felagnum fyri gistingarhús og matstovur, sigur, at eitt er at reka hotell í Havn, har streymurin er so nøkunlunda javnur út og inn.

Men at reka hotell í útjaðaranum er sera tungt, sigur hann.

Tað eru bara nakrir idealistar, sum fara undir slíkt við bjørtum vónum, men sum skjótt finna út av, at teir hava bundið seg so fíggjarliga, at teir sleppa ikki burtur úr tí aftur.

– Grundarlagið er stutt sagt ov lítið, sigur Jeffrei Johannesen. Tað skal líka nógv fólk til at hava eina matstovu, sum selur døgurða til 10 fólk, opna, sum at hava eina, sum selur til 60 fólk. Tímatalið til starvsfólkið verður tað sama, fólk skulu hava løn, og prísurin á tilfarinum lutfalsliga minni, størri nøgdin er.

– Tað er lítið gevandi í mun til stríðið, fólk hava av at reka gistingarhús og matstovur á smærru plássunum, sigur Jeffei Johannesen, formaður í felagnum fyri gistingarhús og matstovur í Føroyum.

# Ferðavinnan riggar til

**Ferðavinnan í Eysturoy er farin at brynja seg til summarið. Onkur nýggjur dagstúrur verður væntandi gjørdur, eins og gamlir kenningar eisini verða á skránni**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Tað ber eisini til at gera gongutúrar í haganum uttan ferðaleiðara*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Runavík:** Kunningarstovan í Runavík ætlar at hava nýggj tilboð á skránni til tey ferðafólkini, sum vitja Eysturoynna í summar.

Ferðavinnan í Eysturoy arbeiðir í løtuni við at gera ein nýggjan faldara við ferðatilboðum í oynni.

Rannvá Troest, leiðari á Kunningarstovuni í Runavík, sigur, at ætlanin hjá ferðavinnuni er at fáa spjatt tiltøkini um alla oynna. Tað krevur tó, at allar kommunur í Eysturoy hava ábyrgdarfólk, sum kunningarstovurnar og ferðafyrireikararnir kunnu venda sær til fyri at fáa ráð og vegleiðing um ymiskt, sum staðkend fólk skulu til.

Ætlanin er eisini at fáa fleiri ferðaleiðarar. Og dentur verður lagdur á so vítt gjørligt bert at hava staðkent fólk sum leiðarar.

Onkur nýggjur túrur fer at verða lýstur í nýggja faldaranum, sigur Rannvá Troest.

Eitt nú túrurin kring Toftavatn og økið har umleið, sum verður ein heildagstúrur, ið bæði verður gjørdur til gongu og við bussi, umframt at tað eisini verður møguleiki fyri at fáa føroyskan mat serveraðan.

Ætlandi skal túrurin byrja við Runavíkar Sjómansheim, haðani gingið verður við staðkendum ferðaleiðara kring Toftavatn.

Eftir at gingið er um Toftavatn, verður farið niðan á Svangaskarð, har Borðreitt verður við føroyskum mati.

Eftir at etið er, verður farið við bussi av Svangaskarði og vitjað verður í báðum kirkjunum í sóknini, Nes Kirkju og Fríðrikskirkjuni, áðren farið verður aftur á Sjómansheimið.

Av gomlum túrum er at nevna gongutúrin av Selatrað niðan á Eysturoyarsillina. Rasmus Skorheim, bóndi á Selatrað, hevur í fleiri ár staðið fyri hesum túrinum, sum nú tykist rættiliga kendur. Rasmus fer eisini í ár at ganga við fólki í haganum.

Nevnast kann, sigur Rannvá Troest, at eitt ferðalag frá einum donskum landbúnaðarskúla kemur til Føroya í vár og skal búgva á Skótadeplinum á Selatrað. Tey ætla eisini at fara gongutúrin við starvsfelaganum á Selatrað.

Eisini aðrastaðani í oynni eru áhugaverd tiltøk. Eitt nú er møguleiki fyri kanorógving og øðrum vatnítrótti á Eiði, eins og gongutúrar eisini veðra gjørdir haðani.

Tó er ikki altíð, at fólk vilja hava ferðaleiðara við. Summi vilja heldur fara fyri seg sjálvan, og tað ber seisini til, sigur Rannvá Troest.

Gjørdur verður ein sonevndur gongufaldari, sum greitt vísir, hvørjar gøtur viðmæltar verða, hvussu merkt er og so framvegis.

Hesin faldarin fevnir um alt landið, og tað eru Ferðaráðið og kunningarstovurnar kring landið, sum standa fyri honum.

Tryggleikin er í hæddini, so um fólk halda seg til tað, sum fyriskrivað er, skuldi eingin trupulleiki staðist av, at fólk eisini fara einsamøll i hagan.

# ítróttur

Nr. 32 • fríggjadagur • 15. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nú eru nógv fleiri um boðið

**Klæmint Matras og Palli Augustinussen vóru fyrstu ferð á landsliðnum, og Jón Rói Jacobsen staðfesti, at hann avgjørt er boð upp á miðverjupláss í EM undankappingini**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*



*At hava ein so góðan fótbóltsspælara í miðverjuni er frágera kærkomið, sigur Jógvan Martin Olsen um Jón Róa Jacobsen eftir dystirnar á Cypros*

Føroyska landsliðsferðalagið kemur aftur til Føroya seinnapartin í morgin. Seinnapartin í dag skulu teir spæla síðsta dystin á venjingarleguni á Kypros. Hann verður ímóti einum pólverskum 2. deildarliði og tískil verða spælararnir ikki skrásettir fyri landsdyst.

Tann einasti av teimum átjan spælarunum, sum ikki hevur verið í eldinum í landsdystunum ímóti Póllandi og Liktinstein, er KÍ málverjin Meinhardt Joensen. Jógvan Martin Olsen sigur, at Meinhardt fer at fáa møguleikan í dag. Ivaleyst iðrar Meinhardt seg serliga nógv um, at liðfelagarnir ikki megnaðu at skora tvey mál afturat í 1. hálvleiki ímóti Liktinstein. Høvdu teir tað, so hevði sannlíkið verið størri fyri, at KÍ málverjin hevði verið skiftur inn síðsta hálva tíman. Men Føroyar skoraðu bara eitt mál, og so er tað væl skiljandi, at venjarin ikki vildi taka roynda Jens Martin Knudsen av vøllinum.

### Fleiri kring landsliðið

Tríggir spælarar komu á landsliðslista. Teir eru Hjalgrím Elttør, KÍ, sum spældi við í báðum dystunum, og sum var heilt tætt við at skora, og so Klæmint Matras, B36, og Palli Augustinussen, VB, sum vóru á vøllinum síðstu løtuna ímóti Liktinstein. Teir báðir fyrst nevndu hava verið á U–17 og U–19 landsliðunum. Merkisvert er tað, at Palli Augustinussen ongantíð hevur verið á yngru landsliðunum. Í 2000 var hann millum stuðulsspælararnar á VB liðnum, sum vann FM heitið, og í fjør stóð hann seg væl í Europa Cup dystunum hjá VB.

Andrew av Fløtum er komin aftur í hitan, Heðin á Lakjuni hevur styrkt sína støðu, Jón Rói Jacobsen er ivaleyst tann, sum hevur styrkt mest av øllum um sína støðu:

– Jón Rói megnaði væl sín leiklut, tá hann varð skiftur inn ímóti Póllandi, og ímóti Liktinstein spældi hann sera væl. At hava ein so góðan fótbóltsspælara í miðverjuni er frágera kærkomið. Hann er eisini so mikið skjótur, at um tað sá út til at eydnast hjá Liktinstein at stinga fram ímillum, so megnaði Jón Rói at fáa fatur aftur á manninum, sum hevði runnið hann av, sigur Jógvan Martin Olsen.

Fyribils venjarin heldur, at manningarliga sær tað gott út, nú ein nýggjur venjari skal taka við, og landsliðið skal undir eina nýggja EM undankapping:

– Tað tykist at vera kapping um øll plássini á liðnum, og tað er positivt. Um vit rokna Christian Høgna Jacobsen, sum sunnukvøldið fór til Spania, og Pól Thorsteinsson, sum tíverri var skaddur ímóti Liktinstein, uppí, so vóru tíggju landsliðsspælarar ikki tøkir ímóti Liktinstein. Tað er tí eg sigi, at tað er kapping um øll plássini, sigur ein væl nøgdur Jógvan Martin Olsen.

## B71 maratonfótbóltsdystur

MARATHON-FÓTBÓLTUR
*tíðindaskriv*

Sandoyar Ítróttarfelag fer 5 árið á rað at hava maratonfótbóltsdyst í høllini á Sandoyar Meginskúla. Byrjað verður fríggjakvøldið 16. februar kl. 18.00 og spælt verður út í eitt til leygarkvøldið 17. februar kl. 18.00.

Tiltakið er frálíkt startskot uppá drúgva fótbóltskapping fyri framman. Ung og eldri møtast at kappast og gleðast um fótbóltsbóltsspælið. Tey, ið ikki tíma so væl bóltin hava høvið til annað undirhald, ið eisini er á skránni.

Dysturin er skipaður á tann hátt, at allir leikararnir, sum spæla við í dystinum verða býttir í tvey lið. Spælt verður so piltar móti piltum, smágentur móti smágentum o.s.fr. Menninir og kvinnurnar spæla um náttina og síðsta tíman av dystinum spæla menninir og kvinnurnar saman t.v.s menn og kvinnur á sama liði. Eisini børn í aldrinum 5-7 ár, børn sum ikki ganga í skúla sleppa at spæla við. Og sum nakað nýtt skulu OLD GIRLS OG OLD BOYS eisini dystast. Fyri at kunna kalla seg Old Girl er kravið 30 ár og eldri. Menninir skulu vera 35 ár og eldri. Umráðandi er fyri B71 at hava so breiða undirtøku sum gjørligt. ”Breið” undirtøka skal her skiljast sum: størri, tyngri og eldri, ið ongantíð eigur at blíva ein forðing fyri gleði á leikvøllum!

Umframt sjálvan dystin er eisini kakutombola og bingo á skránni. Sum áður gjørt er ber til at vedda um úrslit og um, hvussu nógv mál verða skorað teir 24 tímarnar. Hepnu vinnararnir fáa frían ferðaseðil til Týskland at síggja dystin Týskland- Føroyar og til Skotlands at síggja dystin Skotland-Føroyar.

Mikudagin kemur lítil faldari í hvørt hús í oynni við øllum neyðugum upplýsingum um tiltakið og nakað um felagið B71

Sandoyar Ítróttarfelag, B71 bjóðar øllum Sandoyingum og gestum at taka lut í maratonvikuskiftinum 16. & 17. februar.

# Uni hóttir Toda



*Uni Arge er nú bert eitt mál frá føroyska landsliðsmáltindinum*

**HB álopsspælarin kom úr kuldanum og í landsliðshitan á Kypros, har hann skoraði og nú bara er eitt mál frá toppskjúttanum**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Tað er langt frá hvørja ferð, at føroyska landsliðið er vinnari í landsdysti. Tí fløvar sigurin á Liktinstein. Hann var eisini ein staðfesting av, at føroyingar hava gott tak á smáu fótbóltstjóðunum. Burtursæð frá hálva svipsaranum ímóti Andorrra – dysturin í San Fernando í Spania 3. mars 1999 endaði málleysur – hevur tað eydnast at vunnið tvær ferðir 2–1 á Malta, tvær ferðir 1–0 á Liktinstein og 2–0 og 1–0 ímóti Luksemborg.

Higartil hava føroyingar spælt 80 altjóða skrásettar landsdystir. Sigurin ímóti Liktinstein var tann 11. Málmunurin er 48–203. Todi Jónsson er framvegis toppskjútti – við 9 málum. Men nú verður fyrrverandi landsliðsmaðurin hóttur. Málið hjá Una Arge ímóti Liktinstein var tað 8, og tað kom væl við bæði hjá landsliðnum og Una Arge, sum seinasta hálva árið ikki hevur spælt fótbólt. Tí sigur tað seg sjálvt, at tað hevur verið ivasamt við framtíðini á landsliðnum hjá Arge manninum. Men á venjingarleguni á Kypros hevur Uni víst, at hann ætlar sær at seta dám á landskappingina og harvið eisini at vera við í kappingini um plássini í álopinum á landsliðnum.

Todi Jónsson hevur skorað fimm av níggju málum ímóti smáum fótbóltstjóðum. Trý ímóti San Marino í 1995 og tvey ímóti Malta í 1997. Um vit rokna Kypros uppí europeisku smátjóðirnar í fótbólti, so hevur Uni Arge skorað fýra ímóti smátjóðum: tvey ímóti Liktinstein og eitt ímóti Kypros og Malta.